Summar FESTIVALUR - har hittini hittast



# FESTIVALTÍÐINDI
við Ragnhild Ellingsgaard



*Heimskenda ABBA The Show ger vart við seg í Hollywood*

## ABBA The Show:
# - nakað at gleða seg til

Í hesum døgum er ABBA The Show - sum eisini skulu spæla á Summar Festivalinum – á konsertferð í USA. Ferðin gongur strúkandi og fyri bara fáum døgum síðani hevði bólkurin eina super framførslu í heimskenda Hollywood Bowl. 18.000 áskoðarar vóru til staðar og vóru øll fólk púrasta á gosi. Fólk sungu, klappaðu, dansaðu og veipaðu og hetta vóru fólkini aftan bólkin ovurfegin um at síggja.

- Áskoðararnir vóru fantastiskir og mest sum øll stóð og sungu við gjøgnum alla framførsluna. Hetta var veruliga eitt heilt serligt kvøld fyri okkum, sigur Kenneth Svoldgaard, umboðsmaður hjá ABBA The Show.

Konsertferðin í USA heldur fram í eina tíð afturat og tá hon er liðug, kemur heimskenda showið til Føroya at framføra á Summar Festivalinum.



*Tað verður ein øðrvísi blanding av rokktónum, vit fara at hoyra frá bólkinum Marius á Summar Festivalinum*

## Marius á Summar Festival:
# - Rokkur og ukulele

Vit sleppa at uppliva ein bólk í stórformi, tá rokkbólkurin Marius við smittandi gleði, góðum sangum og øðrvísi ljóðførum fer at seta sín dám á Føroya størsta festival.

- Marius er avgjørt ein tann mest sermerkti bólkurin á føroyska pallinum. Við stuttligum og lívligum tónleiki vísti Marius seg at vera eitt satt yvirraskilsi, skrivaði ummælari hjá planet.fo um framførsluna hjá Marius á Asfalt herfyri.

Oddamaður í bólkinum er Hans Marius Ziska, sum fyri nøkrum árum síðani vann føroyska umfarið í GBOB og annars er kendur frá bólkinum Flux, sum var eitt fríkst lot í føroyskum tónleiki um aldarskiftið.

Umframt høvuðsmannin sjálvan er bólkurin mannaður við Brandi Jacobsen, Heðin Ziska Davidsen, Bjarka Meitel, Óla Olsen og Sveini Gaard Olsen. Teir spæla livandi rokk og tora eisini at nýta øðrvísi ljóðføri í tónleikinum – eitt nú harmoniku, ukulele og trækassatrummu.

## Anna Háberg á Summar Festival:
# - Ein sterk og kenslurík rødd

Tað verður ein sterk og kenslurík rødd, sum føroyingar sleppa at uppliva á palli, tá gospelkvinnan Anna Háberg verður við á størsta festivalinum í Føroyum.

Anna hevur fyrr sungið á fleiri ymiskum gospelútgávum – eitt nú Bros og hjá MC Restorff – men í fjør gav hon umsíðir út sína egnu fløgu.

- Eg havi faktiskt arbeitt við hesi fløguni alt lívið og havi droymt um hetta, síðani eg var fimm ára gomul, segði Anna Háberg, tá fløgan varð givin út.

Sama fløgan var eisini orsøkin til, at Anna í fjør varð tilnevnd til virðisløn á Planet Awards. Grundgevingin fyri tilnevningina var, at Anna við hesi útgávu hevur víst, at hon telist millum bestu songrøddir í landinum. Millum annað var sagt soleiðis um hana:

- Anna Háberg megnar í ein nærum óhoyrdan mun í føroyskum høpi at lata kenslurnar leka út gjøgnum røddina. Hetta er so inni, sum kann blíva..

Næsta tónleikaliga stigið hjá Onnu verður so í august mánaða, tá hon saman við bólki kemur á pallin á Føroya størsta festivali.



*Anna Háberg er eitt av teim nýggju nøvnunum á skránni hjá Summar Festivalinum*



## Túnatos

**Anna Maria Sloan er 20 ára gomul og úr Havn. Hon er lesandi í Keypmannahavn og er hetta aðru ferð, hon kemur á Summar Festival**

**1. Hví kemur tú á SF?**
*Tí Nik & Jay spæla!*

**2. Hvør hevur verið besta konsertin nakrantíð á SF?**
*Tað var uttan iva konsertin hjá The Dreams seinasta ár!*

**3. Svevur tú í tjaldi ella ordiligari song á SF?**
*Antin sovi eg í ordiligari song ella koyri eg aftur til Havnar.*

**4. Hevur tú nakrantíð skora á SF?**
*Ja! Eg skoraði sjeikin hjá mær á SF seinasta ár.. :)*

**5. Hvør hevur verið tín løgnasta uppliving á SF?**
*Tað var, tá eg og ein vinkona málaðu okkum sum Batwoman og Spiderman :)*

## Spar pening og keyp atgongumerki nú!

Fríggjadagin tann 17. juli – í ovurmorgin – hækkar prísurin á atgongumerkjunum til Summar Festivalin og tí ræður um at skunda sær, vilt tú hava eitt av teim bíligari vikuskiftispassunum.

Prísurin fyri eitt vikuskiftispass til vaksin er í løtuni 950 krónur, meðan børn (6-12 ár) einans skulu gjalda 200 krónur fyri eitt vikuskiftispass.

Fríggjadagin hækkar prísurin tó og loysir tað seg tí at skunda sær eitt sindur. Atgongumerki til Summar Festivalin fáast til keyps hjá Føroya Tele á heimasíðuni www.ft.fo.